Føroya Banki

# Ársaðalfundur í P/F Føroya Banka hósdagin hin 26. mars 2026

**Uppskot nevndarinnar – dagsskrá pkt. 6b:**

**Uppskot nevndarinnar um viðtøkubroytingar**

Punkt 6b: Nevndin skjýtur upp at skifta verandi áseting í grein 6.2. í viðtøkum bankans við hesa:

*"Aðalfundir bankans verða hildnir í Tórshavn. Ársaðalfundurin verður hildin innan 3 mánaðir eftir lokið roknskaparár.*

*Nevndin hevur heimild til at taka avgerð um, at aðalfundir bankans verða hildnir sum fullfíggjaðir talgildir aðalfundir, treytað av at aðalfundirnir kunnu fullførast á fullgóðan hátt í samsvari við partafelagslógina. Partaeigarar kunnu luttaka, bera fram sínar áskoðanir og atkvøða talgilt. Nærri kunning um mannagongdir fyri skráseting og luttøku skal vera atkomulig á heimasíðu bankans umframt í innkallingini til aðalfundin."*

**Nevndin**